Ár 2005, hin 24. mai

Ár 2005, hin 24. mei kl. 17:00 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Allir limir á fundi uttan Jákup Mikkelsen, Hans Arne Bertholdsen og Kristian Fríðrik Olsen.

Signhild V. Joensen møtir fyri Torleif Sigurðsson.

57.
Roknskapur 2004 – Kl. Bókasavn.
Roknskapurin 2004 hjá Klaksvíkar Bókasavni hevur eitt hall upp á Kr 44.852,- og fyri ikki at koma í likviditetsneyð verður heitt á kommununa um at rinda tann partin, sum írestar, og at upphæddin verður bókað í roknskapinum 2004.

Sí annars skriv frá umsitingini, dagfest 1. apríl 2005, har umsitingin mælir til, at kommunan rindar roknskaparliga hallið í 2004 hjá bókasavninum, og at upphæddin verður bókað í 2004.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini og mælir býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri 2004 hjá Kl. Bókasavni.

Samstundis verður mint á, at deildirnar yvirhalda givnu játtanirnar.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini samtykt.
Roknskapurin góðkendur.

58.
Fíggjarætlan 2006 – Kl. Bókasavn.
Fíggjarætlanin fyri 2006 inniheldur nærum somu tøl, sum árið frammanundan. Nógv tær størstu útreiðslurnar eru lønir og bókakeyp, har tað í báðum førum er torført at spara. Bókasavnið hevur undanfarin ár ikki fingið ynsktu játtan.

Í 2005 vórðu játtaðar Kr 176.000,- minni enn ynskt (kommunan 40% av hesum og landið 60%).

Bókasavnið hevur fleiri ferðir til fánýtis roynt at fingið ein bókavørð í starv aftur at býarbókavørðinum. Tað er sera trupult at fáa ein føroyskan bókavørð, men sær bókasavnið nú ein møguleika fyri hesum.

Sí annars viðmerkingar frá býarbókavørðinum til fíggjar-ætlanaruppskotið og skriv frá roknskapardeildini, dagfest

4. mai 2005, har mett verður, at kommunan verður noydd at gjalda meira enn tær Kr 838.000, sum vístar eru á fíggjar-ætlanini, um ikki sparingar verða gjørdar, hetta tí at løgtingsins játtan ikki røkkur til øll bókasøvnini, og tískil kann vanliga ikki roknast við fullari upphædd haðani.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli 04.05.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

59.
2004-03-039 Grundstykki á Norðoyri, matr. 25a – ummæli.
Búnaðarstovan biður um býráðsins ummæli av, at bóndi á Norðoyri fær til keyps eitt grundøki burtur av festinum sunnan fyri bygdina á Norðoyri.

Sí skriv frá teknisku umsiting, dagfest 7. mars 2005, har m.a. verður greitt frá, at økið, talan er um, er við í samtyktu broyt-ingini í byggisamtyktini fyri Norðoyri, sum í løtuni liggur í Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Vanligt er, at býráðið viðmælir sølu av grundøkjum frá Búnaðarstovuni/Jarðarráðnum, um hetta er í tráð við ætlaða útstykking, og kann umsitingin tí í hesum føri viðmæla sølu, tá byggisamtyktin er broytt, og um ætlanin annars kann rættast eftir kommunalu útstykkingarætlanini.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum frá TU, dagfest 07.03.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku Nevnd.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

60.
Stuðul til bjargingarbát – Norðoya Bjargingarfelag.
Norðoya Bjargingarfelag søkir um stuðul til keyp av einum bjargingarbáti, ið skal hava heimstað í Klaksvík, sum kann koma sjómonnum og økinum til hjálpar.

Bjargingarfelagið hevur fingið tilboð upp á ein bát, ið verður mettur at kosta umleið 1 mill. krónur, tá hann er siglingarklárur í Klaksvík, og heitir á kommununa um at stuðla við 40%, sum svarar til Kr 400.000,-

Í fíggjarætlan býráðsins er eingin játtan tøk til slíkan stuðul.

Á fundi tann 10. mai 2005 samtykti Havnanevndin at umsitingin skal kanna, um peningur er tøkur í ár. Um ikki, mælir nevndin til at játta stuðul komandi ár.

Tekniska Nevnd tekur undir til tilmælinum frá Havnanevndini.

Eftir gjøgnumgongd av fíggjarætlanini fyri 2005 mælir umsit-ingin til flytingar millum kontur upp á íalt Kr 400.000,- til ætlaða stuðulin. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 7. mai 2005 og 17. mai 2005.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini og Teknisku Nevnd og mælir býráðnum til at játta Kr 400.000,- í stuðuli, ið verður fíggjað við flytingum millum kontur smb. notati frá umsitingini, dagfest 17. mai 2005.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini samtykt.

61.
Møgulig umbygging – Svimjihøllin.
Umsitingin mælir til, at 4 mill. kr. verða útvegaðar í hesum ári, so partur av samtyktu umvælingar- og umbyggingarætlanini fyri svimjihøllina kann verða sett í verk beinanvegin.

Sí skriv frá umsitingini, dagfest 6. mai 2005, har m.a. verður greitt frá, at fíggingarparturin verður viðgjørdur á serstøkum fundi um hetta evni.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli frá umsit. 06.05.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, treytað av at fígging verður útvegað.

62.
Bygdarhús í Árnafirði – útseting av freist fyri stuðulstilsøgn.
Vísandi til støðuna í málinum, har Bygdarfelagið Báran fram-vegis bíðar eftir, at kommunan útvegar lendi til bygging av bygdarhúsi, søkir felagið kommununa um at útseta freistina fyri innlatan av endaligari ætlan fyri byggingina til 31.12.2006.

Árnafjarðarnevndin hevur havt málið til kunning.

Mentanarnevndin mælir til at játta útsetan sambært umsókn 06.04.05 frá Báruni.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

63.
Játtanir 2004 at flyta í grunn – býráðið.
Nú øll skjøl fyri árið 2004 eru bókað, verður 2. uppskot til játtanir pr. 31.12.2004, at seta í grunn til seinni nýtslu, lagt fyri býráðið til støðutakan.

Uppgerðin vísir íløgurnar frá 2004, ið ikki eru nýttar í árinum, men sum ætlanir nú eru um at flyta fram til 2005, og grunnar-nar frá undanfarnum árum, ið eru brúktir í 2004.

Viðvíkjandi roknskaparligu mannagongdini mælir roknskapar-deildin til at broyta praksis á tann hátt, at ístaðin fyri at útreiðsluføra avlopini í roknskapinum, so skal avlopið setast upp á fíggjarætlanina árið eftir. Grunnarnir frá undanfarnum árum verða tó viðgjørdir sum áður.

Vísandi til uppseting yvir grunnar ultimo 2004 verður mælt til, at íløgur fyri íalt Kr 7.061.160,- og rakstrarjáttanir áljóðandi íalt Kr 2.620.651,- = samanlagt Kr 9.681.812,- verða fluttar fram til næsta ár. Hetta eru upphæddir, sum ikki eru brúktar í árinum. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 9. mai 2005.

Havnanevndin og Tekniska Nevnd hava havt málið til kunning.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli 09.05.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini, Teknisku Nevnd og Mentanarnevndini.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

64.
2005-02-005 Asfaltarbeiði 2005.
T.U. hevur saman við vegadeildini gjørt ein asfalteringslista yvir vegastrekkir, gongubreytir og parkeringsøkir í kommununi til Teknisku Nevnd til viðgerðar.

Tekniska nevnd tekur undir við ætlanini sum fyriliggur.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

65.
Prinsipielt byggiloyvi til frystigoymslu í Ánunum

Søkt verður um prinsipielt byggiloyvi til frystigoymslu á nýggja havnaøkinum í Ánum

Havnanevndin samtykkir at geva prinsipielt byggiloyvi

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

66.
2005-03-032 Byggiloyvi til smiðjubygning hjá Sp/f Pomek
Pomek søkir um byggiloyvi til smiðjubygning á havnaøkinum uttanfyri Norðborg.

T.U. mælir til at játta prinsipielt byggiloyvi og at endaligt byggiloyvi verður útskrivað tá statiskiskar útrokningar fyriliggja saman við meira nágreiniligum tekningum, og tey matrikuleru viðurskiftini eru fingin uppá pláss.

Havnanevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum frá T.U. dagf. 06.05.05

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

67.
Umsókn um byggiloyvi til seglvirki – Sp/f Føroya Seglvirki.
Søkt verður um byggiloyvi á nýggja havnaøkinum uttan fyri Norðborg.

Havnanevndin hevur havt málið til kunning og setur freistina hjá Seglvirkinum til 1.juni

Tekniska Nevnd mælir til at játta prinsipielt byggiloyvi við somu treytum sum Pomek.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

68.
2005-11-002 Viðv. Faktorshúsunum.
Fyri at fáa økið har á leiðini ferðslutryggari heitir Kristian Eli Zachariassen á Teknisku nevnd um at skipa so fyri, at Faktorshúsini verða burturbeind ella flutt longur vestur.

T.U. leggur upp til nevndirnar at taka støðu til, um "flyting av húsunum" skal takast upp til nýggja viðgerð, ella arbeiðast skal víðari út frá verandi plasering.

Tekniska Nevnd mælir til, at málið verður tikið til umrøðu í býráðnum við atliti til skrivi frá Kristiani Eli Zachariassen.

Býráðsins samtykt:
Málið varð umrøtt og síðani beint aftur til T.U. at gera nærri kanningar.

69.
2005-11-004 Setan staðbundnum starvsfólki í Mikladali/Trøllanesi
Trøllanesnevndin mælir til at persónur verður settur í starv hjá kommununi, og at ein starvslýsing verður gjørd fyri starvið, áðrenn lýst verður leyst

Mikladalsnevndin mælir til at persónur verður settur í starv hjá kommununi, og at ein starvslýsing verður gjørd fyri starvið, áðrenn lýst verður leyst

Tekniska nevnd tekur undir við staðbundnu nevndunum frá 11.04.05

Fíggjarnevndin tekur undir við TrøllanesN 11.04.05, MikladalsN 11.04.05 og TN 10.05.05

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.